## UTTAN ÚR HEIMI

# Borgarstjórin í Bagdad myrdur

**Vápnaðir menn skutu í gjár borgarstjóran í irakska høvuðsstaðnum, Ali al-Haidri**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ali al-Haidri var á veg til arbeiðis gjáramorgunin, tá fleiri vápnaðir menn fóru at skjóta eftir honum og lívverjum hansara. Tá løgreglan kom á staðið, vóru borgarstjórin og ein av lívverjunum deyðir.

Ali al-Haidri er tann hægsti irakski embætismaðurin, sum er vorðin myrdur, síðani ein limur í stjórnarráðnum doyði í einum sjálvmorðsbumbuálopi í fjør. Í september royndu vápnaðir menn at myrða borgarstjóran, men ta ferðina slapp hann við lívinum.

Støðan í Irak er versnað teir seinastu dagarnar. Í gjár doyðu minst tíggju fólk, og 56 vórðu særd, tá ein sjálvmorðsbumba brast í tí sokallaða grøna økinum í Bagdad. Tað er har, irakska stjórnin og amerikanska sendistovan eru. Í einari aðrari bumbuspreinging vórðu minst 16 fólk særd, og fyrradagin doyðu tríggir bretskir hermenn av einari bumbu.



*Ali al-Haidri, borgarstjóri, og ein av lívverjum hansara vórðu skotnir í gjár*

# Ræna hús og íbúðir hjá teimum saknaðu

**Svenska løgreglan leitar eftir ránsmonnum, sum hava rænt hús og íbúðir hjá fólki, sum eru saknað eftir flóðaldúna**

FLÓÐALDAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Síðani flóðalduna hevur svenska stjórnin sýtt fyri at almannakunngera nøvnini á teimum sviunum, sum ikki eru komnir afturíaftur. Orsøkin er ikki, at stjórnin ivast í nøvnunum. Nei, hon vil ikki almannakunngera nøvnini, tí kring landið sita brotsmenn og bíða eftir at fáa at vita, hvørjar íbúðir og hvørji hús standa tóm.

Lars Danielsson í forsætismálaráðnum sigur við Aftonbladet, at myndugleikarnir hava fingið fleiri fráboðanir um, at brotsmenn hava rænt hús og íbúðir hjá fólki, sum ikki eru komin afturíaftur aftan á flóðalduna. Tað sama er hent fólki, sum sluppu frá vanlukkuni við lívinum.

– Íbúðin var snøgt sagt tóm, tá eg kom aftur. Sjálvt sparibússuna hjá soninum høvdu teir tikið, sigur ein 48 ára gamal maður í Lidingø við Aftonbladet.

Gøran Persson, forsætisráðharri, segði fyrradagin, at ger løgreglan av at almannakunngera nøvnini á teimum saknaðu sviunum, má hon eisini átaka sær at verja íbúðir og hús teirra.

# Ísraelsk fyritøka bjóðar ókeypis ávaringarskipan

**Londini við Indiska Havið kunnu fáa eina ísraelska skipan, sum kann boða frá jarðskjálvtum og flóðaldum**

FLÓÐALDAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein íaraelsk fyritøka hevur boðið sær til at lata londunum við Indiska Havið eina skipan, sum er før fyri at staðfesta jarðskjálvtar og at ávara um flóðaldur. Londini kunnu fáa skipanina ókeypis, sigur fyritøkan.

Meir Gitelis, sum hevur ment skipanina, sigur við Reuter, at tólini kunnu staðfesta jarðskjálvta bæði á landi og undir havbotninum. Er ein skjálvti undir havbotninum so harður, at hann elvir til flóðaldu, kunnu tólini boða frá, hvussu stór flóðaldan er, og hvussu skjótt hon ferðast.

– Tólini kunnu eisini siga, hvønn veg flóðaldan fer, og hvussu stór hon verður, tá hon kemur ímóti landi, sigur Meir Giltelis.

Hann vísir í hesum sambandi á, at tað gingu umleið 75 minuttir, áðrenn flóðaldan annan jóladag rakti strendurnar í Teilandi, og at uppaftur longri tíð gekk, áðrenn aldan kom til Sri Lanka og India.

## Eiga 220.000 kr. í part

Gongdin á altjóða virðisbrævamarknaðunum í fjør kom almenna norska oljugrunninum so væl við, at avkastið hjá grunninum lá um 8,5 prosent, skrivar Aftenposten. Tað svarar næstan til hækkingina á altjóða marknaðunum í fjør, sum var 10 prosent.

Serliga oktober ársfjórðingur royndist væl, og sambært Aftenposten vaks avkastið hjá oljugrunninum líka nógv tríggjar teir seinastu mánaðarnar sum allar hinar mánaðarnar í fjør. Teir fyrstu tíggju mánaðarnar vaks virðið umleið 10 milliardir krónur um mánaðin, og tann 30. november var virðið 998 milliardir krónur. Aftenposten roknar við, at oljugrunnurin var 1025 milliardir krónur verdur nú á nýggjárinum.

Tað svarar til 220.000 norskar krónur fyri hvørt mansbarn í Noregi, og tað eru 40.000 krónur meiri enn fyri einum ári síðani, skrivar blaðið.

## Friður í Sudan

Umboð fyri sudansku stjórnina og uppreistrarrørsluna SPLM skrivaðu nýggjársdag undir ein friðarsáttmála, sum skal fáa enda á borgarakrígnum har suðuri í landinum. Kriggið hevur vart í 21 ár og hevur sambært ST kostað meiri enn tvær milliónir mannalív.

Friðarsamráðingarnar hava verið undir ST-leiðslu í kenyanska býnum Naivasha, og suðurafrikanski forsetin, Thabo Mbeki, skrivaði sum vitni undir sáttmálan. Ætlanin er, at tann endaliga undirskrivingin verður í Nairobi í Kenya tann 9. januar.

Tann nýggi sáttmálin snýr seg ikki um harðskapin í landspartinum Darfur, men eygleiðarar vænta, at hann fer kortini at hava ávirkan á viðurskiftini har. Hildið verður eisini, at sáttmálin fer at fáa stóran týdning fyri framburð í øllum økinum, men at hetta kortini er treytað av altjóða stuðuli.

## Nógvir húsagangir

Eftirspurningurin eftir vørum og tænastum er ongantíð vaksin so nógv í Danmark sum í fjør, men kortini vísir tað seg, at sera nógvar danskar tænastufyritøkur fóru á húsagang í árinum, sum fór.

Sambært Købmandsstandens Oplysningsbureau fóru 2.531 fyritøkur á heysin í fjør, og tað er tað mesta seinastu tíggju árini. Teirra millum vóru nógvar matstovur og fleiri gistingarhús, og í flestu førum var talann um fyritøkur, sum byrjaðu fyri umleið fimm árum síðani. Í hesum sambandi er vert at hava í huga, at júst um tað mundið fingu danir nógvar nýggjar matstovur.

Ein kanning í byggivinnuni vísir, at donsku byggifyritøkurnar forvunnu væl fleiri pengar í fjør enn í 2003, men at 372 byggifyritøkur kortini fóru á húsagang í fjør. Tað var 10 prosent fleiri enn árið fyri. Ein kanning hjá byggivinnuni vísir, at nógvar aðrar fyritøkur høvdu negativan eginpening og hall í rakstrinum í fjør.

## Varin at fíggja alivinnuna

Stóri norski bankin DnB Nor ivast framvegis í framtíðini hjá alivinnuni, og bankin fer tí at vera varin, tá talan er um at fíggja alivinnuna, skrivar Aftenposten.

Kjell Stangeland, sum er leiðari á fiskivinnu- og alideildini hjá DnB Nor, sigur við blaðið, at tað er uppgávan hjá alivinnuni at laga seg til broyttu umstøðurnar, men hann heldur ikki, at vinnan hevur ikki víst seg at hava tey neyðugu evnini ella ta neyðugu ábyrgdina í so máta.

– Vit hava gjørt greitt, at vit eru varnir við at fíggja størri útseting og framleiðslu, til marknaðurin hevur funnið eina trygga legu, og prísirnir eru hækkaðir. Men enn hava vit ikki sæð, at vinnan hevur lagað seg eftir teimum broyttu fyritreytunum, sigur Kjell Stangeland við Aftenposten.